Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	29. sept. 2023
Mál nr.:	23/18110-5
Málsviðgjørt:	HP
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	24.09.2016

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk
(Frávik um stuðulsveiting til lesandi í útbúgvingaraldri strikað)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 13, stk. 1 verður aftan á "§ 12" sett: "ella § 13 a".

2. § 13, stk. 2 verður strikað.

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.
Stk. 2. Persónur, sum fær stuðulsveiting sbrt. § 12 ella 13 a, áðrenn henda løgtingslóg fær gildi, fær stuðulsveiting eftir higartil galdandi reglum.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Almenni útreiðsluvøksturin skal tálmast. Sum ein liður í sparitiltøkum í sambandi við fíggjarlógina 2024, er ætlanin, at ung í vanligum útbúgvingaraldri ikki skulu hava rætt til stuðulsveiting sbrt. løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk aftrat lestrarstuðli. Ung við serligum tørvi verða sostatt javnsett við lesandi, ið ikki hava serligan tørv.

1.2. Galdandi lóggáva

Løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk hevur til endamáls at stuðla undir eitt virkið arbeiðslív hjá persónum, sum hava ella kunnu fáa trupulleikar at varðveita ella fáa tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Persónar við varandi virkistarni av heilsuligum ella sosialum orsøkum eru fevndir av løgtingslógini og kunnu fáa stuðul til arbeiðsbúgving.

Arbeiðsbúgving hevur til endamáls at menna ella endurmenna arbeiðsførið, so fólk við t.d. at skifta yrkisleið ella við broyttum arbeiðsviðurskiftum fáa røkt sítt arbeiði og uppihildið sær sjálvum. Dømi um arbeiðsbúgving er ástøðilig útbúgving, yrkisútbúgving, greiðandi fyriskipan, fyrireikandi fyriskipan o.a.

Eitt av týðandi amboðunum at røkka endamálinum er, at tann, ið er í arbeiðsbúgvingar-fyriskipan, fær eina veiting frá Almannaverkinum. Persónur í fyriskipan, ið ikki gevur rætt til lestrarstuðul, fær eina uppihaldsveiting frá Almannaverkinum. Persónur, sum er í fyriskipan, ið gevur rætt til lestrarstuðul, fær eina veiting, ið er sett saman av lestrarstuðli frá Studna og uppihaldsveiting frá Almannaverkinum.

Stuðulsveiting í sambandi við arbeiðsbúgving verður sambært § 13 í løgtingslógini ikki veitt persónum í vanligum útbúgvingaraldri. Tað merkir, at stuðulsveiting ikki verður veitt til:

1) framhaldsdeild fólkaskúlans, tá næmingurin er yngri enn 18 ár,
2) miðnámsútbúgving, tá næmingurin er undir 22 ár,
3) førleikagevandi ástøðiliga útbúgving, tá tann lesandi er undir 25 ár.

Persónur, ið hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, er tó ikki fevndur av avmarkingini omanfyri.

Veiting til persón í arbeiðsbúgving, sum hevur rætt til lestrarstuðul

	Frá Almanna-verkinum	*Frá Studna*	*Eftir skatt og gjøld (umleið)*
Upp til 25 ár – býr ikki saman við foreldrum	4.025 kr.	4.387 kr.	7.800 kr.
Upp til 25 ár – býr saman við foreldrum	3.067 kr.	2.113 kr.	4.650 kr.

Veiting til persón í arbeiðsbúgving, sum ikki hevur rætt til lestrarstuðul

	Frá Almanna-verkinum	*Eftir skatt og gjøld (umleið)*
Upp til 25 ár – býr ikki saman við foreldrum	9.585 kr.	7.000 kr.
Upp til 25 ár – býr saman við foreldrum	5.750 kr.	4.650 kr.

Í § 13, stk. 2 í løgtingslógini er ein áseting um undantak í sambandi við útbúgvingaraldur. Persónur, ið hevur umfatandi arbeiðstarn og djúptøknar persónligar og sosialar trupulleikar, kann, hóast hann er í vanligum útbúgvingaraldri, fáa stuðulsveiting frá Almannaverkinum. Serligu viðmerkingarnar til ásetingina geva ikki nakra ábending um, hvussu umfatandi arbeiðstarn og djúptøknir persónligir trupulleikar skulu skiljast.

Í dag eru 67 næmingar yngri enn 22 ár, sum ganga á miðnámi, harav tey flestu ganga í serliga skipaðum skúlatilboði. 6 næmingar yngri enn 25 ár taka førleikagevandi ástøðiliga útbúgving. Tey flestu av teimum 73 næmingunum, ið fáa stuðulsveiting, búgva heima saman við foreldrum.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at tálma útreiðsluvøkstri landskassans. Endamálið er somuleiðis at javnseta stuðulin til næmingar við serligum tørvi við næmingar, ið ikki hava serligan tørv.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Persónur við varandi virkistarni av heilsuligum ella sosialum orsøkum hevur sambært galdandi løgtingslóg rætt til stuðulsveiting frá Almannaverkinum í sambandi við lesnað. Hetta er tó ikki galdandi, um persónurin er í vanligum útbúgvingaraldri. Ein undantaksáseting í løgtingslógini gevur tó heimild til, at persónur í serligum førum kann fáa stuðulsveiting, hóast hann er í vanligum útbúgvingaraldri. Við hesum uppskotinum verður undantaksásetingin strikað. Tað merkir, at næmingar í vanligum útbúgvingaraldri verða javnsettir og fara frameftir einans at fáa lestrarstuðul.

Broytingin fevnir ikki um persónar, ið hava uppihaldsskyldu mótvegis børnum.

Broytingin verður bara galdandi fyri nýggj mál. Tað merkir, at næmingar, sum hava fingið játtað stuðulsveiting, fara at móttaka veitingina til fyriskipanin endar.

Harumframt er talan um eina tekniska broyting. Í § 13, stk. 1 verður einans víst til § 12. § 13 a er sett í lógina seinni, men § 13 varð av misgáum ikki konsekvensbroytt samsvarandi. Við hesum uppskoti verður løgtingslógin tillagað verandi siðvenju.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er eitt fylgilógaruppskot til fíggjarlógaruppskotið fyri 2024, og tað hava ikki verið stundir at senda uppskotið til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur við sær, at útreiðslur landskassans lækka. Tá broytingin um umleið trý ár hevur fingið fullan virknað, verður árliga sparingin umleið 4 mió. kr. Broyting verður bara galdandi fyri nýggj mál, og fyrsta árið verður sparingin leysliga mett til umleið 1,3 mió. kr.

Í dag fáa 73 persónar stuðulsveiting sambært undantaksásetingini í § 13, stk. 2 í løgtingslógini. Árligu útreiðslurnar til hesar persónar eru umleið 3,5 mió. kr. Harumframt væntast broytingin at hava við sær eina avleidda sparing upp á leysliga mett 0,5 mió. kr., tí tað verða ikki øll, sum fara at søkja um stuðulsveiting beinanvegin, tey lúka aldurstreytirnar.

Metingin tekur ikki hædd fyri, at útreiðslur til t.d. fyritíðarpensjón kanska fara at hækka.

Broytingin hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Verandi áseting í § 13, stk. 2 er ikki greið, og hvørt einstakt mál krevur nágreiniliga fyrireiking. Uppskotið hevur við sær, at § 13, stk. 2 verður strikað, og harvið fær Almannaverkið færri mál at umsita.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur við sær, at næmingar í vanligum útbúgvingaraldri, ið hava varandi virkistarn, frameftir ikki fara at hava rætt til stuðulsveiting frá Almannaverkinum. Hesi fara bara at fáa lestrarstuðul eins og aðrir næmingar.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður ikki, at uppskotið er í andsøgn við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið áleggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Nr. 1
Talan er um eina tekniska broyting. § 13, stk. 1 var av misgáum ikki konsekvensbroytt, tá § 13 a varð sett í lógina. § 13 a verður umsitin á sama hátt sum § 12, og við hesum lógaruppskotinum verður løgtingslógin tillagað verandi siðvenju.

Nr. 2
§ 13, stk. 2 verður strikað, og undantaksásetingin dettur sostatt burtur. Tað merkir, at tað frameftir ikki kann víkjast frá avmarkingunum í § 13, stk. 1.

Til § 2
Gildiskoma. Broytingin er galdandi fyri nýggj mál, og tað merkir, at persónar, sum hava fingið játtað stuðulsveiting, tá henda løgtingslógin kemur í gildi, restina av játtanartíðarskeiðinum kunnu móttaka stuðulsveiting.

Almanna- og mentamálaráðið, 29. september 2023

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur